# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 18.05.2015*

**Fundur í Fíggjarnevndin 18.05.2015 kl. 16.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 25/ 2015 Fíggjarmál**

J.nr.21.00.00-Ø09-1-15

**Málslýsing**

Hin 08.05.2015 kom fíggjarætlanin fyri 2016, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, til ummælis hjá kommununi.

**Tilmæli**

Á fundi 13.05.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2016 soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 26/2015 Havnin**

J.nr.2014-003-0031

**Málslýsing**

Havnameistarin var settur í starv sum avloysari frá 15. juli 2013 og eitt ár fram. 01. august 2014 játtaði havnameistarin seg at røkja starvið til onnur loysn var funnin.

Á nevndarfundi hjá Teknisku nevnd 07.04.2015 var umrøtt, hvussu kommunan møguliga skal skipa arbeiðið á havnalagnum framyvir.

**Tilmælir**

Á fundi 05.05.2015 mælir Tekniska nevnd til, at starvið hjá havnameistaranum verður lagt undir Teknisku fyrisiting, og at lýst verður eftir einum fólki afturat, til Teknisku fyrisiting, at seta í starv frá 1. septembur 2015.

Á fundi 13.05.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 27/2015 Vegamál**
J.nr. 2013-0044-066
**Málslýsing**
Nes kommuna hevur havt fleiri fundir við Landsverk viðv. yvirtøku av einum parti av landsvegnum. Síðsti fundur hesum viðvíkjandi var 4. mars 2015, har Nes kommuna vísti á, at kommunan ynskti at yvirtaka vegin frá nýggju gongubreytini, í Gerðinum, til síðsta sethúsið á Agninum.

23.04.2015 er skriv komið frá Landsverki viðv. yvirtøku av landsvegnum, har víst verður til fundin, tann 4. mars 2015, og tað ynski, sum Nes kommuna bar fram á fundinum, um at yvirtaka ein part av landsvegnum í Nes kommunu, frá nýggju gongubreytini, í Gerðinum, til síðsta sethúsið á Agninum, so verður við hesum boðað frá, at umsóknin ikki verður gingin á møti.

Landsverk er tó sinnað at ganga umsóknini á møti, um yvirtøkan gongur til Blákrossheimið.

**Tilmælir**
Á fundi 05.05.2015 mælir Tekniska nevnd til at boða Landsverki frá, at Nes kommuna er sinnað til at fara í samráðingar við Landsverk um at yvirtaka ein part av landsvegnum í Nes kommunu, frá nýggju gongubreytini, í Gerðinum, til Blákrossheimið.

Á fundi 13.05.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 30/2015 Trivnaðarmál**
J.nr. 16.06.20-G01-1-15
**Málslýsing**
Í skrivi 04.05.2015 søkir Barnagarðurin um játtan á 40 tímar stuðul um vikuna til barn við serligum tørvi, sum byrjar í Barnagarðinum 10.08.2015. Barnið hevur tørv á, at eitt starvsfólk er um tað og hevur ábyrgdina av tí alla tíðina, tá barnið er í barnagarðinum.

**Tilmælir**
Á fundi 07.05.2015 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Barnagarðinum stuðul til 40 tímar um vikuna til barn við serligum tørvi.

Á fundi 13.05.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini. Peningurin verður tikin av stovninum Børn við serligum tøvri.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 18.05.2015*

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 31/2015 Fíggjarmál**
J.nr.00.32.10-S08-1-15
**Málslýsing**
Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2014 hjá Nes kommunu, soleiðis sum hann er uppsettur av SPEKT.

Roknskaparleiðarin hjá Nes kommunu, framlegði roknskapin fyri bygdaráðnum.

**Avgerð**
Bygdaráðið viðgjørdi roknskapin, og hevði ikki ítøkuligar viðmerkingar. Bygdaráðið samtykti at góðkenna ársroknskaðin fyri 2014.

*PS. Ársroknskapurin fyri 2014 sæst her heimasíðuni undi leinkjuni, kommunan í tølum.*

**Mál nr. 32/2015 Fíggjarmál**
J.nr.00.32.10-S08-2-15
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttan til Skálafjarðarsamstarvið.

Fyribils fíggjarlig uppgerð pr. 31.03.2015 og framrokning fyri 2015 er komin frá Skálafjarðarsamstarvinum.

Framrokningin staðfestir, at tað koma at mangla 3 mió. kr. í til raksturin í mun til løgdu fíggjarætlan fyri 2015. Herav er parturin hjá Nes kommunu kr. 600.000.

**Tilmæli**
Á fundi 13.05.2015 mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 600.000 til Skálafjarðasamstarvið, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.